gult cyan magenta svart



# Landskassin: 650 mió í yvirskoti í ár



*-Tað verður neyðugt at føra ein varnan lønarpolitikk, bæði á almenna og á privata arbeiðsmarknaðinum, segði Anfinn Kallsberg, løgmaður í ólavsøkurøðuni.*
*Mynd: Jens K. Vang*

Áki Bertholdsen

- Ferðin á føroyska búskapinum er stór. Tí er tað av alstórum týdningi, at rikin verður ein strammur búskaparpolitikkur, har almennu verklagsjáttanirnar ávirka virksemið í landinum sum minst, og har vit halda aftur í lønarvøkstrinum.

Tað segði Anfinn Kallsberg í løgmansrøðuni, sum hann legði fram, tá ið tingið varð sett ólavsøkudag.

Hann vísti á, at føroyski búskapurin er framvegis í stórum vøkstri og tí er tað tað neyðugt at fylgja neyvt við gongdini í búskapinum. Løgmaður segði, at vøksturin í lønarútgjaldingunum hesi seinastu árini hevur verið millum 7% og 10%.

-Hesin vøksturin sær út til at standa við. Fyrra hálvár í ár eru samlaðu lønarútgjaldingarnar 10% hægri enn sama tíðarskeið í 1999. Í meðal hava framleiðsluvinnurnar havt ein lønarvøkstur upp á 11% í fyrra hálvári í 2000, sammett við sama tíðarskeið í 1999.

**Vaksin 32%**

Anfinn Kallsberg segði eisini, at rættiliga stórur vøksturur hevur verið í innflutninginum seinastu árini. Innflutningurin vaks 10% frá 1997 til 1998 og 16% 1998 til 1999.

- Tøl eru enn bert tøk fyri fyrsta ársfjórðing í ár, og tey vísa, at samlaði innflutningurin tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár er 32% størri enn somu tíð í fjør. Størsti vøksturin er í innflutninginum av brennievni v.m., sum 1. ársfjórðing í ár er vaksin við 101 mió. kr. ella 131% samanborið við sama tíðarskeið í fjør. Innflutningurin av skipum var 1. ársfjórðing 68 mió. kr. ella 118% størri enn sama tíðarskeið í fjør.

- Taka vit hesar bólkarnar burtur úr, er samlaði innflutningurin 15% hægri 1. ársfjórðing í 2000 enn somu tíð í fjør.

- Annars heldur tann stóri vøksturin fram í innflutninginum av tilfari til byggivinnuna, aðra framleiðslu og av maskinum, har vøksturin var ávikavist 21%, 16% og 16%.

- Innflutningurin til beinleiðis nýtslu vaks 6% frá 1998 til 1999, meðan vøksturin í fyrsta ársfjórðingi í 2000 var 16% størri enn í somu tíð í fjør. Haraftur-ímóti sær út til, at tann stóri vøksturin í innflutninginum av bilum er steðgaður. Innflutningurin av persónbilum var 7% minni fyrsta ársfjórðingi í ár, sammett við somu tíð í fjør.

Men tað er ikki bara innflutningurin sum veksur, tí tað ger útflutningurin eisini.

- Útflutningurin uttan skip hevur verið í støðugum vøkstri seinastu árini. Útflutningurin vaks frá 1997 til 1998 við 14% og frá 1998 til 1999 við 11%. Útflutningurin fyrstu 5 mánaðirnar í 2000 er 10% hægri enn sama tíðarskeið í 1999.

Annars vísti Anfinn Kallsberg á, at kappingarførið hjá útflutningsvinnuni er munandi batnað seinastu árini. Tað er av týdningi, at gongdin í lønarhækkingum verður hóvlig tey komandi árini, so kappingarførið ikki aftur versnar sammett við tey lond, sum okkara útflutningsvinna kappast við.

Hann segði, at yvirskot hevur verið á handilsjavnanum øll 90-árini, men hart trýst hevur verið á handilsjavnanum seinastu árini. Búskaparvøksturin hevur verið stórur, og hóast útflutningurin er vaksin, er innflutningurin vaksin meira.

- Úrslitið er, at avlopið er minkað. Fyrsta ársfjórðing í ár eru tó 68 mió. kr. í avlopi á handilsjavnanum, tá skip ikki eru tald við. Verða skipini tikin við, er avlopið 11 mió. kr.

Ferðin á búskapinum sæst aftur í inntøkum landskassans. Í 1999 var yvirskotið á fíggjarlógini 648 mió. kr., og broytist gongdin ikki stórvegis, verður yvirskoti minst líka stórt í ár. Fyribilsskatturin hjá landskassanum í fyrra hálvári í 2000 er 61 mió. kr. ella 13% hægri enn sama tíðarskeið í 1999 og hann er væl hægri enn mett á fíggjarlógini.

**Mugu halda aftur**

Fíggjarpolitikkurin hevur stórt sæð verið at halda aftur í vøkstrinum í útreiðslunum á fíggjarlógini.

Íløgutørvurin hevur verið og er stórur, men hóast tað og stóran búskaparvøkstur hevur borið til at halda aftur í almennu íløgunum. Arbeitt verður við eini langtíðarverklagsætlan fyri landskassan, sum skal samskipast við eina langtíðarverklagsætlan hjá kommununum. Ætlanin er at gera eina 10 ára ætlan fyri landskassan og eina 5 ára ætlan fyri kommunurnar.

Endamálið er at sleppa undan teimum stóru búskaparsveiggjunum og meira brúka almenna virksemið til at stýra búskaparligu gongdini í samfelagnum.

Tað verður hildið ráðiligt í løtuni at byggja fyri 160 — 170 mió. kr. um árið, og roynt verður at leggja íløgurnar har í landinum, sum virksemið ikki er so stórt. Tó verður neyðugt at byrja umvælingarnar á Landssjúkrahúsinum.
Hann segði, at ætlanin er at verklagslætlanin skal endurskoðast hvørt ár. Men sjálvt um tølini verða broytt eftir umstøðunum, er tað umráðandi ikki at víkja frá sjónarmiðnum um at brúka løguætlanina sum eitt amboð at stýra búskapinum, so tað almenna ikki er við til at skumpa undir eina skeiva búskapargongd.

Anfinn Kallsberg segði, at tað verðu eisini neyðugt at halda aftur í almennu lønunum og landsstýrið miðjar framvegis efftir at reka ein varnan lønarpolitikk.

Løgmaður segði eisini, at almennu útreiðslurnar eru ikki minkaðar í krónum seinastu árini. Men vøksturin hevur verið minni enn vøksturin í inntøkunum. Tað hevur eydnast at økja yvirskot landskassans ár undan ári, og hevur landskassin í dag eitt sera gott gjaldføri.

- Nettouttanlandsskuldin er burtur. Skuldin hjá landskassanum til danska statin er framvegis 4,5 mia. kr., men nettoskuldin hjá landskassanum er umleið 3 mia. kr., tá ið tað, sum stendur í Landsbankanum, verður tikið við. Nettoskuldin hjá landskassanum er væl lægri, um peningur, sum liggur í grunnum og virðið av Føroya Banka verður tikið við.

- Eitt úrslit av rikna politikkinum er, at tað almenna er ein minni partur av samlaða búskapinum. Hetta er eitt politiskt ynski, sum hevur staðið frammarlaga hjá samgonguni, segði Anfinn Kallsberg.

gult cyan magenta svart



## Ítróttar- og samkomuhøllin á Kambsdali

Av tí at verandi leiðari og umsjónarmaður við Ítróttar- & Samkomuhøllina á Kambsdali nú leggur frá sær, verður starvið sum leiðari/umsjónarfólk hervið lýst leyst at søkja.

Starvið umfatar í høvuðsheitum:

- Skipa fyri at fáa mest møguligt av tiltøkum at fara fram í høllini.
- Mótøka av bíleggingum um tiltøk og venjingartíðir.
- Tilrættalegging av tiltøkum og venjingartíðum.
- Eftirlit við tiltøkum og venjingum í høllini.
- Dagligt eftirlit av ognum hallarinnar, bæði innan og uttan.
- Dagligt eftirlit og viðlíkahald av bygningi og øllum útbúnaði hallarinnar.
- Ábyrgd og eftirlit av dagligu reingerðini í høllini.
- Ábyrgd og eftirlit av reinhaldi av uttanumøki.
- Ábyrgd av vanligu innkeypunum til høllina.
- Dagliga samskifti millum høll og viðskiftafólk.

Yvirordnaði leiðarans er hallarnevndin.

Viðkomandi skal hava góð samstarvsevni, og annars kunna arbeiða sjálvstøðugt. Tað kann vera fyrimunur, at hava onkra handverksútbúgving, men tó ongin treyt.

Løn sambært avtalu.

Starvið er ætlað at seta 1. september 2000, ella so skjótt eftir hetta sum gjørligt. Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

Møguligar umsóknir, ið skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi **12. august 2000**, skulu sendast til:

**Hallarnevndina**
Postbox 38 · 530 Fuglafjørður


# Dugir tú at servera?

**Til matstovu okkara verður søkt eftir servitrisu / tænara at byrja beinanvegin.**

Arbeiðstíð og løn eftir nærri avtalu.

Vit bjóða tær eitt gott arbeiðspláss og góðar samstarvsfelagar í einum nógv vitjaðum umhvørvi.

Hevur hetta tín áhuga, vinarliga ring 21 96 96 ella 31 97 67.

RIO BRAVO Tel 319767 RESTAURANT

RIO BRAVO • Tórsgøta 11 • Tórshavn




## ENDURLÝSING

### Leiðari til barnaansing í Nólsoy

Við hesum verður søkt eftir leiðara til kommunalu barnaansingina í Nólsoy at seta sum skjótast. Fyrimunur er, um viðkomandi hevur pedagogiska útbúgving. Nærri fæst at vita við at venda sær til Leo Poulsen á tlf. 32 70 12.

Samstundis verður søkt eftir 3 hjálparfólkum at arbeiða fulla tíð á stovninum.

Løn eftir sáttmálanum hjá Pedagogfelagnum.

Umsóknarfreist 8. august.

**Nólsoyar Kommuna**
Tlf. 327038 · Nólsoy

Um stovnin: Fram til summarfrítíðina vóru 12 børn á stovninum, væntandi verða fleiri í heyst. Ansingin hevur verið skipað í eini 10 mánaða royndartíð og verður so skjótt leiðari er settur skipað fast framyvir.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3027

**Navn:** Sp/f Hjá Símuni
**Adressa:** Nólsoyar Pállsgøta, 700 Klaksvík

**Kommuna:** Klaksvíkar Kommuna
**Stovningardato:** 22.06.2000
**Vi›tøkudato:** 22.06.2000
**Kapitalur:** Kr. 300.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kr. 300.000,00 í ø›rum vir›um til kurs 100.
**Stovnari:** Símun Akursmørk, Uppsalagøta 2, 700 Klaksvík.
**Nevnd:** Jonna Elisabeth Akursmørk, Uppsalagøta 2, 700 Klaksvík (forma›ur), Símun Akursmørk, Uppsalagøta 2, 700 Klaksvík og Elisabeth Akursmørk, Skálatavegur 17, 700 Klaksvík.
**Stjórn:** Símun Akursmørk, Uppsalagøta 2, 700 Klaksvík.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur bundi› vi› undirskrift av nevndini ella einum stjóra.
**Grannsko›ari:** : Finnur Sivertsen, Búskaparstovan, 700 Klaksvík.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2000 - 31.12.2000
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil og anna› virksemi í hesum sambandi.
**Felagi›** er stovna› vi› umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 26. juli 2000

Kristin Balle


# FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT




**GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR**

**Tlf. 32 22 22**


Almanna- og Heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin

## Skrivari

Eitt starv sum skrivari í Almanna- og heilsumálastýrinum, Starvsfólkadeildini, er leyst til setan frá 1. september 2000 ella eftir nærri avtalu.

**Arbeiðið umfatar í høvuðsheitum:**
Vanligt skrivstovuarbeiði.
Umsiting av starvsfólkamálum.

**Vit hugsa okkum at tú hevur:**
Skrivstovuútbúgving. Kunnleiki til starvsfólkaumsiting er ein fyrimunur.
Hollan kunnleika til skrivligt føroyskt.
Kunnleika til EDV á brúkarastøði.
Góð samstarvsevni.

**Vit bjóða:**
Eitt starv, sum tú sjálv/ur verður við til at skapa, til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi við góðum skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið í lønarflokki 9 - 12. Setanarøkið umfatar Almanna- og heilsumálastýrið og stovnar undir tí.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Fríða B. Nielsen tlf. 30 40 93.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til:
Almanna- og heilsumálastýrið
Eirargarður 2
100 Tórshavn.

**Umsóknarfreist: 15. august 2000 kl. 14.00**



## Kommunuskrivstovan í Gøtu

verður stongd vegna summarfrí frá 1. august til og við 7. august.

Frá 8. august og til og við 15. sept. verður avgreiðslan opin vanligu dagarnar, tó bert fyrrapart frá kl. 10–12.

## Sumbiar Kommuna

Ætlanin er at seta barnaansing á stovn í Sumbiar Kommunu, um tørvur er á barnaansing.

Umsóknir um ansingarpláss skulu vera Sumbiar Kommunu í hendi áðrenn 15. august 2000.

**Sumbiar Kommuna**
FO-970 Sumba